## UTTAN ÚR HEIMI

## Kanska tvær fólkaatkvøður

Tann 1. juni skulu niðurlendsku veljararnir taka støðu til ta ætlaðu ES-grundlógina, men longu nú verður roknað við, at stjórnin fer at skipa fyri einari fólkaatkvøðu afturat, skuldi tað hent, at veljararnir siga nei tann 1. juni.

Allir teir stóru politisku flokkarnir í Niðurlondum taka undir við grundlógini. Politiskir eygleiðarar vænta ikki, at stjórnin fer at gera annað enn tað, sum fólkið sigur, sjálvt um úrslitið ikki er bindandi fyri stjórnina ella tingið. Kortini vænta summir eygleiðarar, at stjórnin fer at halda eina fólkaatkvøðu afturat næsta ár, um niðurlendingar velja at siga nei í næstu viku.

Politikararnir hava sagt, at teir ætla sær at taka støðuna hjá veljarunum til eftirtektar, men tað er tó treytað av, at meiri enn 30 prosent av veljarunum taka lut í fólkaatkvøðuni.

## Stuðul hvørvur

Ein kanning, sum granskarar í Noregi og Tanzania hava gjørt, vísir, at ein rættiliga stórur partur av pengunum, sum onnur lond lata Tanzania til ymisk menningarmál, kemur ongantíð vegin fram.

Eitt nú avdúkar kanningin, at ímillum 36 og 46 prosent av pengunum, sum vórðu játtaðir til at menna skúlaverkið í Tanzania, fóru aðrar vegir. Uppaftur verri var við teimum pengunum, sum vórðu játtaðit til skúlabøkur, tí har restaðu næstan 80 prosent í, tá saman um kom.

Annars er skúlaverkið í Tanzania ment sera nógv. Fyri tveimum árum síðani samtykti stjórnin eina umfatandi nýskipan, og við pengum frá Heimsbankanum og fleiri londum er tað eydnast at fáa 90 prosent av børnunum at ganga í skúla ímóti 55 prosentum fyri tíggju árum síðani.

Ein meginorsøk til gongdina er, at fyrr máttu foreldrini gjalda, fyri at børnini kundu sleppa at ganga í skúla, men nú fáa børnini pengar afturfyri at koma í skúla.

## Kolabjarnir svølta

Vandi er fyri, at fleiri túsund kolabjarnir á avstralsku oynni Kangaroo Island kunnu doyggja í hungri. Orsøkin er, at bjarnirnar eru vorðnar ov nógvar í tali, og tí hava myndugleikarnir gjørt av at gelda nógvar teirra.

Í 1996 vísti ein kanning, at tá vóru 5.000 kolabjarnir á Kangaroo Island, men hildið verður, at í dag er talið umleið 27.000. Nú er so ætlanin at gelda umleið 8.000. Mike Rann, ráðharri, sigur við Reuters, at sum er verður stovnaður tvífaldaður á hvørjum ári, og tí hevur tað skund at avmarka vøksturin, sigur hann. Summir serfrøðingar halda, at tað munar ov lítið at gelda tær 8.000 bjarnirnar, og teir hava skotið upp at skjóta umleið 20.000.

Ofta eru tað rovdjór, sum avmarka aðrar djórastovnar, men soleiðis er ikki við kolabjørnini, tí hon er ikki føði hjá nøkrum rovdjóri.

## Koyra ov skjótt

Bøturnar fyri brot á ferðslulógina eru munandi hægri í Noregi enn í hinum Norðurlondunum, men tað tykist ikki hava stórvegis ávirkan á koyrihugin hjá teimum norsku bilførarunum.

Í einari kanning, sum Gallup júst hevur gjørt, sigur ein fjórðingur av teimum spurdu, at tey koyra ofta skjótari, enn loyvt er. Samstundis halda tey flestu, at bøturnar fyri ov nógva ferð eru alt ov høgar, og at myndugleikarnir áttu at skeitt eftir, hvussu ov nógv ferð verður sektað aðrastaðni.

Tað er kanska heldur ikki so løgið. Koyrir tú 75 km/t á einum teini í Svøríki, har hámarksferðin er 60 km/t, skalt tú gjalda 900 danmskar krónur í bót. Í Finnlandi er bótin fyri eitt tílíkt brot 700 krónur, men vágar tú tær at gera tað sama á teimum norsku vegunum, er bótin 2.600 danskar krónur.



# Danska tilbúgvingin virkaði als ikki

**Donsku myndugleikarnir vóru alt ov seinir at hjálpa sínum borgarum eftir flóðalduna í Suðurasia, og samskiftið var alt ov vánaligt**

FLÓÐALDUFRÁGREIÐING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Hvørki telefon- ella internetkervið hjá uttanríkisráðnum í Keypmannahavn kundi nøkta tørvin, tá fólk vildu hava at vita, hvat var hent teimum nógvu donsku borgarunum, sum vóru staddir í Teilandi og aðrastaðni, tá flóðaldan skolaði inn yvir land har annan jóladag í fjør. Myndugleikarnir vóru eisini alt ov seinir at hjálpa, og samskiftið ímillum myndugleikarnar, ferðaskrivstovurnar og almenningin var alt ov vánaligt. Stutt sagt virkaði tilbúgvingin ikki.

Tað stendur í einari frágreiðing, sum uttanríkisráðið hevur gjørt um tað, sum hendi eftir vanlukkuna. Niðurstøðan er, at fleiri broytingar mugu gerast. Uttanríkisráðið skal hava eitt lið, sum kann sendast til vanlukkustaðið beinanvegin, kunningin ímillum løgregluna og uttanríkisráðið skal betrast, og samskiftið við frðaskrivstovurnar má eisini broytast.

Harafturat skal uttanríkisráðið stovna eina heimasíðu, har myndugleikarnir skulu kunna almenningin um gongdina.

Flóðaldan í Suðurasia kostaði meiri enn 225.000 mannalív. 42 danir eru higartil skrásettir deyðir, og fýra eru ikki komnir afturíaftur.

# Hann skuldi gera bumbu fyri Al-Qaeda

**Tann 68 ára gamli amerikanarin Allen Gracula skuldi gera ein bumbu fyri Al-Qaeda, men løgreglan lumpaði hann í eina fellu**

BUMBUMAÐUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Allen Gracula á veg úr rættarhølinum í Houston aftan á avhoyringina mánadagin*

Allen Gracula visti ikki betur, enn at hann stóð og tosaði við ein umboðsmann hjá Al-Qaeda seinasta fríggjadag. Hann greiddi manninum frá, hvussu hann ætlaði sær at gera bumbuna, til tann fremmandi gjørdi vart við, at hann var agentur hjá samveldisløgregluni FBI.

Mánadagin var tann 68 ára gamli amerikanarin í rættinum í Houston í Texas, og har varð hann varðhaldsfongslaður fyribils. Ákærin, Michael Shelby, segði undir avhoyringini, at ákæruvaldið fer at krevja minst 15 ára fongsul, og at Allen Gracula skal sita í fongslinum øll 15 árini.

Sambært tíðindastovunum hevði Allen Gracula ikki havt samband við Al-Qaeda, men ákæruvaldið vil vera við, at hann var til reiðar at selja felagsskapinum hjá Osama bin Laden bumbuna, tá hann var liðugur at gera hana.